## VIÐMERKINGAR

# Fyrispurningur til Høgna Hoydal, landsstýrismann

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



**Løgtingsmál nr. 100-17/2002: Viðvíkjandi Grundlógarnevndini og arbeiði hennara**

1. Hvussu nógv fólk eru - ella hava verið í starvi í sambandi við arbeiðið hjá Grundlógarnevndini?
2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa fyri tinginum, hvat arbeiðið hjá Grundlógarnevndini hevur kostað higartil, og hvat roknað verður við, at arbeiðið í framtíðini fer at kosta?
3. Kann landsstýrismaðurin vísa eina útgreining fyri útreiðslurnar av grundlógararbeiðnum, síðani arbeiðið fór í gongd?
4. Hvussu stórur partur av útreiðslunum er ferðaútreiðslur, og hvussu eru hesar útgreinaðar?
5. Hvussu nógvan pening ætlar landsstýrið at nýta til grundlógararbeiðið í 2003?
6. Hava fólk, sum samstundis eru lønt í aðrari almennari tænastu, verið - ella eru sett í starv við løn?

**Viðmerkingar:**

Í februar 1999 samtykti Løgtingið at seta eina Grundlógarnevnd, sum skuldi lata landsstýrinum álit og uppskot til føroyska grundlóg í seinasta lagi 1. juni 2000.

Hetta varð gjørt í samsvari við samgonguskjalið, sum segði, at tá grundlógin var samtykt á Løgtingi, skuldi hon til fólkaatkvøðu í seinasta lagið ár 2000.

Grundlógarnevndin byrjaði sítt arbeiði av álvara á heysti 1999. Rímiliga skjótt varð funnið fram til ein arbeiðshátt, ið øll nevndin kundi standa saman um, hóast motiveringin var ymisk. Hjá nøkrum nevndarlimum var málið fullveldi, meðan aðrir nevndarlimir gjørdu vart við, at teirra motivering heldur var, at arbeiðið kundi vera til nyttu á annan hátt.

Í nevndini sótu heilir 16 limir, harav nakrir vóru politikarar, nakrir løgfrøðingar og nakrir samfelagsfrøðingar. Skrivari var eisini settur í fast starv.

Umframt eina ørgrynnu av plenum-fundum, har øll nevndin var við, og bólkafundum, skipaði nevndin eisini fyri skeiði í mannarættindum og hevði fleiri útlendskar serfrøðingar á vitjan. Eisini varð ein bólkur settur undir Grundlógarnevndini, sum skuldi gera eitt uppskot til eina føroyska rættarskipan. Í bólkinum sótu serkønir løgfrøðingar umframt formaðurin í Grundlógarnevndini.

Ætlanin var at skipa fyri hoyringum um ymsu evnisøkini og eisini á annan hátt at tryggja eina breiða kunning og eitt breitt orðaskifti í øllum landinum, tá arbeiðið var liðugt, og alt skuldi so enda við eini fólkaatkvøðu.

Men arbeiðið í Grundlógarnevndini gjørdist drúgvari enn frammanundan mett, og í apríl 2001 samtykti Løgtingið at broyta lógina soleiðis, at nevndin skuldi lata landsstýrinum eitt fyribils álit og uppskot til grundlóg (Grønbók) í seinasta lagi 1. oktober 2001, og endaligt álit (Hvítbók) 31. desember 2001.

Men heldur ikki tann tíðarætlanin helt, og nú verður arbeitt við at seta grundlógarnevndina av nýggjum.

Tað kundi tí verið áhugavert at fingið at vita, hvussu nógv fólk eru - ella hava verið í starvi í sambandi við arbeiðið hjá Grundlógarnevndini, og hvat arbeiðið higartil hevur - og væntandi fer at kostað. Eisini kundi verið áhugavert at fingið at vita, hvussu útreiðslurnar eru útgreinaðar, og um fólk hava verið - ella eru sett í starv við løn, sum samstundis eru í aðrari almennari tænastu við løn?

Síðani fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 varð lagt fyri Løgtingið, hevur tað fingið nógvar atfinningar fyri, at ymiskar útreiðslur ikki hava verið tiknar við. Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur í tí sambandi sagt, at einki er sett á fíggjarlógina, sum krevur lógarbroyting.

Fyri at seta grundlógararbeiðið í gongd aftur, má lógin broytast, og tí verður spurt, um heldur einki er sett av til grundlógararbeiðið, og um hvussu landsstýrið ætlar at hesin peningur skal fáast til vega, um einki er sett av.

*Á Løgtingi,*
*tann 24. oktober 2002*

# Vágatunnilin letur upp fyri jól

**Vágatunnilin p/f**
*KB EL-teknik NCC*
*Vága konsortiet I/S*
*Dávid Reinert Hansen*
*Knud Balle*
*Niels Larsen*
*Leynar, 29. okt 2002*

**TÍÐINDASKRIV TIL KUNNGERÐAR 29. OKT 2002**

Eftir tingingar millum partarnar á byggiplássinum í Leynum og gjøgnumgongd av arbeiðunum, ið eftir eru at gera, eru felags avtalur gjørdar, um neyðug tiltøk, soleiðis at Vágatunnilin kann latast upp fyri ferðslu 10. december 2002.

Eitt av umráðandi evnunum, sum bleiv avgreitt, var, hvussu neyðugu arbeiðini í sambandi við trygdarútgerð í tunlinum kundu fáast liðug á nøktandi hátt.

Avtalurnar føra við sær at minni týðandi partar av arbeiðinum verða gjørdir eftir at ferðsla er í tunlinum, her í millum ljósmastrar við tunnilsmunnarnar og rundkoyringina í Leynum. Onnur írestandi arbeiði í sjálvum tunlinum koma at vera gjørd á náttartíð, tá tunnilin kann steingjast fyri ferðslu.

Við avtalunum, sum nú eru gjørdar, eru ósemjurnar loystar og partarnir eru samdir um í felag at gera sítt besta fyri at tunnilin verður opin fyri ferðslu 10. dec. í ár.

# Mannarættindi í Russlandi

**TÍÐINDASKRIV**
*Amnesty International*

Russiska sambandsríkið: Gíslatøkan í sjónleikarhúsinum er enn eitt dømi um manglandi virðing fyri mannarættindunum.

Amnesty International almannakunnger í dag eina frágreiðing um mannarættindabrot í Russlandi. Samstundis fordømir felagsskapurin gíslatøkuna í einum sjónleikarhúsi í Moskva og sigur, at hetta er enn eitt dømi um, hvussu skammiliga mannarættindini hjá vanligum fólki verða vanvird í russiska sambandsríkinum.

Meðan tjóðin syrgir um sorgarleikin, tók Irene Khan, aðalskrivari í Amnesty International undir og segði: »Eg syrgi um offrini og veiti syrgjandi familjunum og teimum, sum vóru likamliga og sálarliga særd av tilburðinum mína djúpastu samkenslu.«

Hon vísti á, at stríðið í Tjetjenia longu hevði kravt stór tap. Hon bað inniliga myndugleikarnar um at verja mannarættindini hjá øllum borgarum, bæði russarum og tjetjenum.

102 síður stóra frágreiðingin hjá Amnesty International The Russian Federation: Denial of Justice‰, sum í dag (týsdagin 29. oktober) verður almannakunngjørd í Moskva, vísir á umfevnandi mannarættindabrot í Russlandi. Hon vísir, hvussu offrunum verður noktað rættvísi, og hvussu tey framhaldandi eru útsett fyri nýggjum mannarættindabrotum. Tey, ið fremja brotsgerðirnar, sleppa vanliga snikkaleys og kunnu aloftast halda fram við sínum brotum.

Hetta er fyrsta átakið móti Russlandi, og Amnesty International krevur, at tað beinanvegin verða gjørd tiltøk fyri at berja niður týðandi mannarættindabrotini í Russlandi..

»Tann ræðuliga gíslatøkan í sjónleikarhúsinum í Moskva er ein ræðandi áminning um óloystu støðuna í Tjetjenia. Vit hava fordømt hesa kriminellu atgerð sum eitt vanvirðiligt mannarættindabrot«, segði Irene Khan.

»Hendan hópgíslatøkan er enn eitt skammiligt mannarættindabrot, íbirt av einum stríði, sum hevur viðført stóra sorg og líðing hjá øllum, tað hevur rakt, í einum landi, har mannarættindabrot eru vanlig, og uppreisn fyri tey sjáldan kemur fyri«.

Tá ið fólk runt um í heiminum hugsa um mannarættindabrot í Russlandi, hugsa tey um Tjetjenia. Men tað tey fægstu vita er, at tað sama sum sermerkir tjetjenisku støðuna: at tey seku sleppa órevsaði, tíverri gjøgnumseyrar alla kriminalrættarskipanina í Russlandi.

Frágreiðingin hjá Amnesty International (Denial of Justice) vísir á mannarættindabrot í øllum landinum. Hesi umfata píning á politistøðum; ræðuligar, ómenniskjaligar og vanærandi umstøður í yvirfyltum fongslum, full av sjúkum; rasistiskan yvirgang móti etniskum og religiøsum minnilutum og fremmandum; burturflytingar, »hvørvingar« og píning, herundir neyðtøkur.

»Ein oyðileggjandi ringur av mannarættindabrotum finnst í Russlandi í dag. Um Putin, forseti, ynskir at fremja leiklutin hjá Russlandi sum stórveldi, má hann byrja við at tryggja øllum í Russlandi veruligt rættvísi og rættindi«, segði Irene Kahn.

»Í hesi avgerandi løtu í søgu Russlands, má Putin, forseti, vísa altjóða politisk leiðaraevni og ikki gera somu mistøk sum vestanfyri: at skerja mannarættindi fyri at berja niður altjóða terrorrismuna.«

»Putin, forseti, má ikki nýta stríðið móti terrorismuni til at sleppa undan at konfronterast við sýtanina av rættvísi, sum seyrar gjøgnum alt tað russiska samfelagið«, segði hon.

Amnesty International kemur við mongum tilráðingum um, hvussu støðan skjótt kann betrast og vendir sær bæði til russisku myndugleikarnar og altjóða samfelagið fyri at taka undir við teimum. Tær umfata viðtøku av eini serligari revsilóg fyri harðskap í heimunum, stovnanina av einum óheftum stovni, sum skal kanna, hvussu ofta og hvar píningar koma fyri, og broytingar í skipanini við passum og skrásetingum, tí núverandi skipan elvir til skipaða diskriminering.

Í frágreiðingini verður sagt frá fleiri persónum, sum hava verið fyri mannarættindabrotum. Hetta er ein teirra.-

Marina T. varð steðgað av ferðslupolitinum í Yaroslavl 5. mars 1999, og tá teir hildu hana vera fulla, tóku teir hana við til eina avrúsingardeild. Tá hon var komin hagar, noyddu tríggir politistar og ein lækni hana at lata seg úr øllum, smekkaðu høvdið á henni móti einum veggi og slógu hana í andlitið. Hon sigur, at hon varð dragsað eftir hárinum inn í rúmið við síðuna av, har hon varð neyðtikin av fýra monnum. Undir rættarviðgerðini morgunin eftir sigur Marina T, at hon royndi at greiða dómaranum frá píniningini, men at hann avbreyt hana og ákærdi hana fyri at hava brúkt seg móti politistunum, áðrenn teir tóku hana. Marina T. kærdi, og tvey ár seinni undir endaligu rættarviðgerðini kom rætturin til ta niðurstøðu, at ein av politistunum við vilja hevði gjørt seg inn á hana og meinslað hana, men hann varð beinanvegin náðaður og leyslatin aftur.

Tveir aðrir politistar fingu treytaðan dóm og mistu rættin til at arbeiða sum politistar í tvey ár. Verjin hjá Marini T. hevur vrakað niðurstøðuna og rættarmálið heldur fram.



## UTTAN ÚR HEIMI

# Akhmed Zakajev fongslaður í Danmark

**Tað er ivasamt, um Danmark kann útflýggja Russlandi kekenska varaforsætisráðharran, sum varð varðhaldsfongslaður í Keypmannahavn í gjár**

**DANMARK**
*Árni Joensen:*

Tað var eftir upplýsingum frá russisku myndugleikunum, at danska løgreglan gjørdi av at handtaka Akhmed Zakajev stutt eftir klokkan tvey gjáranáttina, og fyrrapartin í gjár avgjørdi ein rættur í Keypmannahavn, at hann skal sita í varðhaldi í Danmark í 13 dagar.

Russar vilja vera við, at Zakajev, sum er kekenskur varaforsætisráðharri, var við til at fyrireika gíslatøkuna í Moskva í síðstu viku, og teir vilja eisini vera við, at hann var uppi í yvirgangsatsóknum árini frá 1996 til 1999.

Russland hevur kravt at fáa Akhmed Zakajev útflýggjaðan, men beint eftir úrskurðin hjá rættinum í gjár kom fram, at danir eru ikki á einum máli um, hvørt hann kann latast russum ella ikki. Danski sendiharrin í Moskva, Lars Vissing, segði í gjár, at Danmark kann ikki útflýggja Akhmed Zakajev til Russlands, tí eingin slíkur sáttmáli er millum londini, og haraftrat hevur Russland framvegis deyðarevsing, segði sendiharrin.

Men í løgmálaáðnum í Keypmannahavn hava tey eina aðra áskoðan. Haðani varð sagt í gjár, at Danmark og Russland hava staðfest altjóða sáttmálan frá 1957 um at útflýgja brotsmenn, og at løgmálaráðið fer at nýta hesa samtyktina sum grundarlag fyri støðutakanini.

Tað er løgmálaráðið, sum tekur ta endaligu avgerðina, og har fara tey nú at kanna tilfarið, sum russisku myndugleikarnir hava latið donsku løgregkuni um Ahmed Zakajev.

Zakajev var í Keypmannahavn, tí hann hevði tikið lut í kekensku heimsráðstevnuni, sum var har mánadagin og týsdagin.

# Vil hava mannin dømdan til deyða, er hann sekur

**Fyrrverandi kona John Allen Mohammad, sum er skuldsettur fyri at vera snigskjúttin í Washington, tekur undir við, at hann fær deyðarevsing, er hann sekur**

**SNIGSKJÚTTAMÁLIÐ**
*Árni Joensen:*

Carol Williams, sum er fyrrverandi kona John Allen Mohammad, segði í einari sjónvarpssending, at er fyrrverandi maður hennara sekur í skuldsetingini, er tað rætt at døma hann til deyða.

– Verður hann funnin sekur í at hava sitið í bili sínum og skotið ósek fólk, ja, so er tað rætt at døma hann til deyða, segði Carol Williams í sendingini hjá CNN.

Sonur John Allen Muhammad, Lindbergh Williams, segði, at pápi hansara eigur at fáa ta revsing, sum hann hevur uppiborið.

– Sjálvt um hann er pápi mín, so haldi eg, at ein heystar tað, ein sáðar. Var hann førur fyri at gera tað, sum hann er skuldsettur fyri, so má hann eisini taka avleiðingarnar av tí, segði sonurin.

Amerikanska ákæruvaldið hevur nú eisini sett tann 41 ára gamla John Allen Muhammad og tann 17 ára gamla John Lee Malvo í samband við eitt morð í statinum Washington á amerikansku vesturstrondini. Løgreglan hevur illgruna um, at tað vóru teir, sum myrdu ta 21 ára gomlu Keenya Cookí býnum Tacoma tann 16. februar í ár.

Frammaundan eru teir báðir skuldsettir fyri at hava myrt tíggju fólk og sært trý onnur á leiðini kring høvuðsstaðin Washington. Teir eru eisini skuldsettir fyri at hava myrt eitt fólk og sært ein mann í statinum Alabama fyrr í ár.



*Carol Williams, sum hevur verið gift við John Allen Muhammad, sigur, at hann eigur at fáa deyðarevsing, er hann sekur*

# Amina verður ikki steinað til deyða

**Myndugleikarnir í Nigeria fara ikki at góðtaka, at Amina Lawal verður steinað til deyða**

**DEYÐAREVSING**
*Árni Joensen:*

Myndugleikarnir í Nigeria siga nú, at teir fara ikki at góðtaka, at tann 31 ára gamla Amina Lawal verður steinað til deyða. Ein dómstólur hevur dømt kvinnuna til deyða, tí hon fekk eitt barn uttan fyri hjúnarlag, og eftir dóminum skal hon steinast til deyða.

Dómurin vakti ans um allan heim, og nigerisku myndugleikarnir hava fingið ein hóp av mótmælum frá politiskum leiðarum, mannarættindafelagsskapum og einstaklingum. Í nógvum londum vórðu undirskrivtir savnaðar ímóti deyðadóminum. Eisini nógvir føroyingar skrivaðu undir eitt tílíkt mótmæli.

Nú er so líkt til, at tey nógvu mótmælini hava havt sína ávirkan, tí í gjár segði nigeriski varauttanríkisráðharrin, Dubem Onyia, at stjórnin fer ikki at loyva, at Amina Lawal verður steinað til deyða.

Eygleiðarar halda, at avgerðin hjá nigerisku myndugleikunum hevur samband við vakurleikakappingina Miss World, sum verður í Nigeria tann 7. desember. Frakland, Kanada, Noreg, Belgia, Kenya og Fílabeinsstrondin hava boðað frá, at tey fara ikki at senda síni umboð til kappingina sum mótmæli ímóti deyðadóminum ímóti Aminu Lawal.

Sambært fyrireikarunum hava tey seks londini lovað at broyta avgerðina, verður deyðadómurin settur úr gildi.

## 30 tikin í Moskva

Russisku myndugleikarnir hava seinastu dagarnar tikið fleiri fólk, sum verða løgd undir at hava havt tilknýti til kekensku uppreistrarmenninar, sum tóku meiri enn 800 fólk gíslar í Dubrovka-leikhúsinum.

Bretska útvarpið BBC visti í gjár at siga, at umleið 30 fólk eru tikin, og at bæðo politiskir ráðgevar og trygdarmenn eru millum tey tiknu. Longu mánadagin ljóðaði, at myndugleikarnir høvdu tikið ein løgreglumann, sum varð settur í samband við gíslarænararnar.

Í gjár doyðu tveir gíslar afturat á einum sjúkrahúsi í Moskva. Sambært myndugleikunum eru 117 gíslar nú deyðir.

## Stungu danskan bónda

Danin Wolle Kirk, sum er bóndi í Zimbabwe, liggur á einum sjúkrahúsi í høvuðsstaðnum Harare, eftir at nakrir ránsmenn lupu á hann og stungu hann fleiri ferðir við knívi.

Sambært donskum sjónvarpi komu ránsmenninir til garðin hjá Wolle Kirk, har teir hóttu hann og konuna, fingu teir ikki teir virðislutir, sum tey áttu. Tá tey sýttu fyri at lata teimum virðislutirnar, vórðu tey bæði bakbundin, og síðani lupu ránsmenninir á Wolle Kirk og stungu hann 17 ferðir við knívi.

Wolle Kirk hevur fleiri ferðir sagt, at hann ætlar sær at verða verandi í Zimbabwe, og at hann ætlar sær at verja sín bóndagarð har.

## Skjøl verða almenn

Vatikanið í Rom hevur nú kunngjørt, at tað fer at lata almenningin fáa atgongd til skjøl, sum viðvíkja tíðarskeiðinum undan seinna heimsbardaga.

Nógvir søgufrøðingar og jødiskir felagsskapir hava leingi biðið um at fáa atgongd til skjøl, sum snúgva seg um pávan Pius XII, sum doyði í 1958. Vatikanið sigur, at skjølini, sum almenningurin fær atgongd til, viðvíkja tíðarskeiðinum frá 1922 til 1939.

Eugenio Pacelli, sum pávin tá æt, umboðaði Vatikanið í týska høvuðsstaðnum Berlin, áðrenn hann gjørdist pávi, og jødiskir felagsskapir vilja vera við, at hann gjørdi lítið og einki fyri at steðga jødatýningini í Týsklandi undir seinna heimsbardaga. Ein talsmaður hjá jødiska felagsskapinum í Italia er vónsvikin av avgerðini hjá Vatikaninum, tí felagsskapurin heldur skjølini frá krígsárunum frá 1939 til 1945 vera tey týdningarmestu. Men tey vil Vatikanið ikki lata almenningin síggja – ikki enn í hvussu er.

## Dýrur føðingardagur

Fimtan sviar, sum vóru farnir til Cannes í Fraklandi at halda ein 30 ára føðingardag, fingu ein rættiligan skelk, tá teir fingu rokningina frá matstovuni, sum teir hildu føðingardagin á.

Rokningin var upp á heilar 427.000 krónur. Maðurin, sum eigur matstovuna, sigur, at sviarnir m. a. keyptu eina fløsku av reyðvíni av slagnum Chateau Margeaux frá 1961, sum kostar 132.493 krónur. Sviarnir drukku eisini annað vín, og alt var av tí dýra slagnum, sigur matstovueigarin.

Ein av sviunum sigur við Aftonbladet, at vínið varð sett á borðið, uttan at teir høvdu bílagt tað, og teir ivaðust ikki í, at tænarin skemtaði, tá hann legði rokningina á borðið. Sjálvur rindaði hann 50.000 krónur við bankakortinum. Ein dómstólur skal nú taka støðu til málið.